# 100 ár og ómerktur

**Meðan kvinnur kring allan heimin vóru til 8. marshald, var kaldbaksmaðurin, Martin Dam farin inn í Kaldbaksbotn í heilt øðrum ørindum – í roynd og veru í 100 ára føðingardag. Henda dagin í 1907 varð nevniliga deksbáturin "Royndin Fríða" navngivin. Báturin er framvegis í drift og eitur nú "Cameron"**




*Cameron hevur flotið í meiri enn 100 ár á sjónum. Her má hon verða liggjandi: Verður hon standandi ov leingi á landi, tornar viðurin upp*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Skip & bátar

**Snorri Brend**
snorri@sosialurin.fo

**Kaldbaksbotnur:** Veðrið er einki at reypa av. Tað er turt til tíðir, men av og koma sannir skúrar av tøttum regni. Her inni sæst ikki ein sál.

## Fakta

**Navn:** Cameron
**Smíðiár:** 1907
**Smíðistaður:** Klaksvík
**Tilfar:** Eik/fura
**Longd:** 12,41 metrar
**Breidd:** 3,81 metrar
**Dýpd:** 2,26 metrar
**BRT:** 19,14
**NRT:** 7,42

Við havnarlagið liggja fleiri bátar í ymiskari støðd. Onkur teirra hevur samband við aling, men hesa løtuna er einki lív at hóma her við havnarlagið.

Tað er kortini ein einstakur bátur, sum hevur motorin frá og ljósini tendrað. Á stýrihúsinum stendur navnið á bátinum "Cameron" og undir tí "Anno 1907".

Inni í stýrihúsinum standa tveir mans og práta - brøðurnir Eyðun og Martin Dam, hvørs fyritøka "Inntakt" keypti bátin fyri sløkum ári síðani. Fyritøkan hevur serliga lagt seg eftir at skifta tak á bygningum í Føroyum og uttanlands.

– Nei, bara róligur. Vit ætla ikki at skifta arbeiði, fyri at gerast útróðrarmenn burturav.

– Vit ætla hinvegin at innrætta hann til stuttleikabát, sigur Martin um útróðrarbátin sum henda dagin hevði júst 100 ár á baki. Hetta er samstundis elsta skip sum er bygt her á landi og sum framvegis er í drift.

Tað vóru kortini ikki tær stóru festligheitirnar umborð á sjálvum bátinum í sambandi við henda runda føðingardagin. Heima í Kaldbak mundi helst verða øðrvísi, tí júst henda sama dagin hevði Martin sjálvur føðingardag!

### Uppkallaður

Aðrastaðni á síðuni er greitt frá tíðini, tá Cameron fyri 100 árum síðani varð bygdur í Klaksvík.

Hann fekk tá navnið Royndin Fríða, men broytti seinni navn til Sóleyð N.

Martin sjálvur kundi ynskt sær av givið bátinum sítt upprunaliga navn aftur.

– Men hetta ber tíverri ikki til. Orsøkin er at navnið er farið, tí ein annar bátur í Fuglafirði hevur hetta navnið.

– Ístaðin hava vit uppkallað abba okkara Donald Cameron, sum var enskur hermaður her undir krígnum, greiðir Martin frá.

### Til ferðafólk

Øll hesi 100 farnu árini hevur Royndin Fríða, og seinni Sóleyð N verið til fiskiskap bæði við Føroyar og undir Íslandi.

– Ja, hann hevur havt íslands-